


# TJALDRIÐ

FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI 2021

## Tjaldrið 2021

**Blaðstjórar/Editors**
Birita Zachariassen og
Dina Fríða Poulsen

**Blaðfólk/Writers**
Olivia, Birita, Dina,
Tóra, Zeke, Katrina,
Elisabet

**Rættlesarar/Proofreaders**
Katrina, Elisabet

**Ummælarar/Reviewers**
Leann, Elisabet, Tanja

**Myndprýðarar/Illustrators**
Marið, Leann, Hannah, Zeke,
Halldis

**Fotografar/Photographers**
Birita, Tóra, Dina, Elisabet,
Zeke, Lív

**Grafikarar/
Graphic designers**
Birita, Dina, Leann, Olivia,
Katrina, Tanja, Zeke, Hannah,
Marið

**PR-fólk/PR-Team**
Dina, Hannah

**Perma**
Leann Olivia Á Kósini

**Poster**
Hannah Nolsoe

**Lærarar**
Arnbjørn og Bárður

**Prent**
Føroyaprent

Føroya Fólkaháskúli 2021
**www.haskulin.fo**


# Vælkomin til Tjaldrið

Blaðið er framleitt av næmingunum á Føroya Fólkaháskúla á heystskeiðnum 2021/22. Vanliga hava næmingar bert tvær vikur til at framleiða blaðið, men í ár høvdu vit 3-4 vikur. Hetta blaðið er gamalt, tí tað var fyrstu ferð útgivið 16. januar 1902, so tað er nógv eldri enn vit, 119 ár. Men tá og nú er munur á, tí fyrr skrivaðu tey við hond í eina bók og lósu tað upp hvønn leygardag, nú skriva vit í eina teldu, prenta tað og gloyma tað.

Her á skúlanum uppliva vit nógv spennandi. Vit hava ymiskar kreativar næmingar, sum øll lýsa sín kreativitet upp á hvør sín máta og fáa sínar tankar út upp á ein vakran máta niður í eitt blað. Alt her er gjørt við hjarta.

Tilfarið í blaðnum er sera ymiskt. Men eitt, sum fyllir nokk so nógv, er søgan um Olla-bolla og Kukki-bolla, sum Dina Fríða Poulsen hevur skrivað og upfann saman við Elisabet Falkvard Joensen á túrinum í Suðuroy, tá ið vit fóru ein gongutúr til Hvannhaga, og tær sóu Lítla Dímun. Tekningarnar til hana hava Marið Neslíð og Leann Olivia á Kósini gjørt.

*Birita Zachariassen og Dina Fríða Poulsen*






Felagsmynd

# Temavika

*Olivia og Katrina*

Eftir fyrstu introvikuna á skúlanum, høvdu vit okkara fyrstu felags verkætlan. Evnið var røtur.
Hvør árgangur á Føroya Fólkaháskúla fær uppgávuna at mála eitt risastórt lørift, sum hongur í gongini. Í samband við hetta, byrjaðu vit við at gera nógvar smáar venjingar, og vórðu deild upp í tríggjar smærri bólkar. Í bólkunum gjørdu vit nógvar ymiskar ljóðupptøkur, við saksum, klapp, lýnlási, klaveri, kalimba osv. Vit gjørdu eisini føroyskar yrkingar úr kliptum orðum. Aftan á tað komu vit øll saman aftur og fóru út at taka upp filmsbrot við svørtum regnjakkum. Vit dansaðu eisini føroyskan dans, sum fyri tey flestu á háskúlanum hevur samband til teirra røtur. Vit dansaðu tí føroyskan dans á løriftinum, við leirpulvuri á fótunum, og fikseraðu tað á løfritið, og gjørdu so tað sama umaftur við nýggjum litum, inntil tað líktist einum ∞-tekni. Til okkara miniframsýning høvdu vit gjørt eitt filmsbrot, sum varð víst á løfriftinum. Tað var gjørt úr smáu venjingunum, vit høvdu gjørt áðrenn, og ein persónur í hvørjum bólki las okkara yrking, rytmurnar vóru bakgrundsljóð, og okkara upptøkur frá runt í skúlanum gjørdist ein mystisk frásøgn.





# Næmingaprofilar



**Olivia Binding Jakobsen**
- 21 ár 15/09/00 Jomfrú
- Danmark: Tønder
- @oliviabinding



**Elisabet Falkvard Joensen**
- 17 ár 23/02/04 Fiskur
- Føroyar: Vágar, Miðvágur
- @elisabetjoensen



**Birita Zachariassen**
- 17 ár 25/02/04 Fiskur
- Føroyar: Borðoy, Klaksvík
- @lbella_catl



**Halldis Haraldsen**
- 17 ár 19/03/04 Fiskur
- Føroyar: Suðuroy, Vágur
- @halldisharaldsen



**Tanja Falkvard**
- 17 ár 27/05/04 Tvíburðar
- Føroyar: Vágar, Sørvágur
- @tanjafalkvard



**Tóra Birgirsdóttir Lauritsen**
- 17 ár 25/06/04 Krabbi
- Føroyar: Vágar, Miðvágur
- @tora_birgirsdottir



**Dina Fríða Poulsen**

- 17 ár 15/07/04 Krabbi
- Føroyar: Vágar, Miðvágur
- @dina_f_poulsen



**Leann Olivia Á Kósini**

- 17 ár 12/09/04 Jomfrú
- Føroyar: Borðoy, Klaksvík
- @leemonademagic



**Ezekiel Joseph**

- 16 ár 15/01/05 Steinbukkur
- U.S: Florida
- @zekee714



**Katrina Marnadóttir**

- 16 ár 11/02/05 Vatnberi
- Føroyar: Streymoy, Vestmanna
- @katr11111na



**Hannah Nolsoe**

- 16 ár 22/04/05 Tarvur
- Conneticut/Føroyar: Streymoy, Tórshavn



**Marið Neslíð**

- 16 ár 17/08/05 Leyva
- Føroyðar: Eysturoy, Toftir
- @marid_neslid

# HÁSKÚLALÍV

## Listasavnið

Vi har været på kunstmuseet Listasavnið to gange, den første gang i forbindelses med at få inspiration til vores første kunstneriske fælles projekt. Vi så udstillingen TÓNAR TAKA SKAP af HEIÐRIK, som er en udstilling der viser processerne i hans kunstneriske arbejde, som ikke i første omgang var tiltænkt skulle ses af offentligheden. Udstillingen er et blik ind i hans arbejdsrum og en adgang ind bag om det kreative univers.

Vi har også været oppe på museet for at lave skriveøvelser, hvor vi skulle blive inspireret af billederne i den faste udstilling og derefter vælge et, som vi skulle skrive et digt om. Vi gentog øvelsen nede i udstillingen med HEIÐRIK, der var det bare helheden af udstillingen og ikke et billed vi skulle skrive digt om.



## Danseeksperimentet

I forbindelse med at vores seje danselærer Diana var en del af et projekt, der hed Danseeksperimentet, tog højskolen hen og så deres mega fede danse fremvisning.

Danseprojektet havde foregået over mange måneder, og havde været udsat på grund af corona. I ugen op til forestillingen samledes alle danserne her på højskolen, som ellers har arbejdet på kryds og tværs af lande for at sætte deres danseopvisning op.



## Norðurlandahúsið

I den første uge på højskolen tog vi til Norðurlandahúsið, for at se og primært høre tre audiovisuelle installationer der hed A Faroese Tale, Sounds of Doubt og Nordic Grammar, af kunstnerne Thuríður Jónsdóttir, Jeannette Castioni, Olga Szymula, Kaspar Peters og Bjørn Svin. Udstillingerne var lavet i forbindelse med Nordic Music Days

Hver af installationerne havde deres eget rum, den første vi så var Nordic Grammar, som er en visuel film, hvor man følger en kvinde der prøver at sætte rødder. Den næste installation, A Faroese tale, var en surrealistisk lydcollage, hvor man kunne lægge sig ned. Den sidste installation var Sounds of Doubt. Denne installation var et resultat af en workshop med tre forskellige nordiske lande Island, Grønland og Færøerne. Workshoppen blev brugt som inspiration til det færdige lydlandskab, som bestod af en video der desværre ikke virkede, da vi var der, 3d-havbunde fra hvert af de deltagende lande, en mikrofon sat sammen med et spektrogram, så man kunne se hvordan ens egen stemme påvirkede bølgerne på spektrogrammet.



# Joël

I ugen op til efterårsferien havde vi fornøjelsen af at blive undervist af Joël, som er uddannet nycirkus-artist med speciale i linedans og klovneri. Hans umiddelbare oplæg for ugen var, at vi skulle lære at manipulere objekter, blive komfortable med at stå på en scene og få kendskab til kroppens muligheder. Ugen bestod derfor af en hel masse små øvelser såsom at arbejde med jonglørbolde, stave, tørklæder og ikke mindst kroppen. En af de første øvelser vi fik var: Vi skulle dele os op i par. Den ene skulle have lukkede øjne, den anden skulle føre. De fleste kender til denne øvelse, men vi tog den et skridt længere. Vi eksperimenterede både med, hvor man kunne navigere personen fra, hvilken hastighed man gik i og om personen skulle kravle eller side på en bænk osv.





# Romeo & Julie

I midt september var vi inde og se en ny version af Romeo og Julie, opsat af norske Kompani13. Teaterstykket var skabt med meget få virkemidler, det bestod af to skuespiller, en selvstående tavle med papir, to tuscher og en hobbykniv. Tilskuerpladserne var sat op sådan, at der var tre rækker stole og tre rækker stole over for os, så der var en catwalk i mellem os, og det var her skuespillerne havde scene. Skuespillerne havde sat det op som en fortælling, med udspillede scener. I starten blev vi præsenteret for hver en karakter, der var med i stykket sådan vi kunne holde styr på, hvem der spillede hvem. Hver side af publikum blev også inddraget som hver sin familie, Capulet og Montague.

# Halloween

Fyrst í oktober fingu vit hugskotið um at halda eina lítla Halloweenveitslu, og at skera Graskar. Vit fingu 1.000 kr frá skúlanum til at keypa tað útgerð, sum vit vildu hava til veitsluna, og so byrjaðu vit at gera ein lista við tí, vit vildu keypa (góðgæti, chips og sodavatn).

Dagin fyri veistluna skóru vit græskørini og settu tey uttan fyri skúlan sum pynt. Síðani keyptu vit inn og pyntaðu skúlan til fríggjadagin, í tímanum, sum átti at vera Útferð og smíð og annað.

Fríggjakvøld gjørdu vit okkum klár, og pyntaðu okkum. Eg var ein heks.
Vit møttust øll á bókasavninum og sungu og lurtaðu eftir Halloweensangum, í meðan summi fingu sær andlitsmáling. Aftan á fóru vit inn í sjónvarpstovuna og hugdu at filminum The Addams Family, meðan vit hugnaðu okkum við bommi, sodavatni, og muffins, sum Tóra hevði bakað.






# PRE-PLAY INTERVIEW

Interviewer: Ezekiel Joseph (Zeke)

## What are any of your concerns before the play and/or what are you excited about?

That I have to speak Faroese
How the mermaid will move since the water affects have not been decided - ***Olivia***

I'm excited to see my friends on stage. - ***Leann***

I'm confident about the play but worried I might mess up one of my lines. - ***Dina***

One of my worries are if that our ambitions were too high and we would not finish the play in time.
- ***Bárður***

I've done some plays before, I'm excited to act.
- ***Tanja***

Concerns are not liking acting and the play isn't fully written yet. - ***Katrina and Marið***

I'm excited about the play and the final product of the poster. - ***Hannah***

## How's prop making going? What prop is taking the longest to do?

We're looking for an artistic expression of the costumes, cinematography, and background. We're in the process of building it up slowly. - ***Súsanna***

Choosing which beta design out of the three sketches.
- ***Hannah***

I'm turning the gym hall into a multipurpose arena that lets us control the environment and enables us to conduct plays, exhibitions, ect.
- ***Bárður***

## How are the recitals going? What are some of the things giving you trouble during practice

The actors know their lines, it's going really well. We're working on individual scenes at a time.
- ***Súsanna***

We say lines too fast and sometimes forget them.
- ***Birita***

Súsanna has many ideas she wants to put during practice.

Practice is going very good, basically just remembering lines. - ***Tóra***

Recital is going well, I've been trying to find the perfect voice for the father. - ***Dina***

### What are you doing for your costume

We might go with big robes and a mask plus something on our heads. - ***Katrina and Marið***

Not sure yet, going to have puffy hair and an exaggerated comb to run through my hair." Bárður mentioned that the designes will be more simplistic. Not sure how we're going to make the mermaid tail. - ***Olivia***

I'm basing my design off a character from Pirates of the Caribbean. - ***Tanja***

Right now it's looking like I'll have a big dark skirt and a t-shirt. - ***Tóra***

### What are you working on now?

I'm working on how to better express my lines in the Ása, Guðrun, and Eyðun conversation scene. - ***Birita***

Working on making a beat for the mermaid's tragic love song. - ***Olivia***

We're working on speech, our props and where we are going to stand. - ***Katrina and Marið***

I'm currently working on outlining Ása for the school play poster and drawing. - ***Hannah***



**Cast**

Tóra: Ása
Tanja: Magnus
Dina: Eyðun
Birita: Guðrun
Leann: Húskallurin Jákup
Marið, Elisabet and Katrina: Nornur
Hannah and Zeke: Backstage Crew
Súsanna: Producer and Director
Bárður: Scenographer and Producer

# OLLI BOLLI & KUKKI BOLLI

Søga: Dina - Tekningar: Leann og Marið

Tað var ein køld sunnunátt. Olli-bolli gekk fram við barrina og suffaði, ongantíð fyrr hevði hann hugsað um at farið her, men her stendur hann so. Hann fór inn og setti seg við diskin. Barrvørðurin, sum stóð har og reinsaði eitt glas, hyggur at Olla-bolla. "Hvat skal tað vera?" spyr barrvørðurin. Olli-Bolli hyggur upp og svarar: "Gev mær bara tað, sum fær meg at gloyma." Barrvørðurin smáflenti og tók eitt glas av hillini og fylti rúsandi drykkin niðurí og setti tað framman fyri Olla-Bolla. Olli-Bolli rætti hondina fram, tók glasið og smakkaði sær á - Uff, sum tað smakkaði illa - men hann drakk kortini.

Barrvørðurin hugdi forvitin upp á Olla-Bolla og spurdi: " Hvaðani kemur tú? Eg havi ikki sæð teg fyrr." Olli-bolli hugdi upp, at barrvørðinum: "Eg eri komin allan vegin úr Lítlu Dímun." Barrvørðurin gjørdist bilsin: "Hvussu kann tað vera, at tú ert komin eina so langa leið og situr her nú? Um eg kann spyrja, sjálvandi."
Olle-Bolle smáflenti og segði so: "Jú, tað skal eg nokk fortelja tær."

*Tað var ein summarmorgun, og Olli-Bolli vaknaði í songini hjá sær og føldi á sær, at hetta fór at verða ein góður dagur. Hann opnaði vindeyguni, og sólin skein beint inn og hitaði alt, hon nært við. Olli-bolli gjørdi sær ein góðan morgunmat og setti seg við vindeygað at njóta matin. Hann hoyrdi fuglasangin, og tað angaði av summari. Uttan fyri vindeygað sá hann aldurnar langt burturi bresta inn á Suðuroynna, og hvussu grasið stóð so stilt. Eitt lítið lot kom inn og kíndi Olla-Bolla um andlitið, og angin av summari gjørdist sterkari, enn hvat hann var áðrenn.*

*Knappliga hoyrdi hann eitt hart ljóð. Onkur hevði blakað okkurt á úthurðina. Tað ljóðaði bleytt, men nóg tungt at gera ljóð. Olli-Bolli reisti seg og fór yvir til úthurðina. Tá ið hann opnaði hana, fekk hann sjokk og small næstan um. Tí á nýggju duramáttuni lá ein stórur klumpur av lorti. Olli-Bolli visti beinanvegin, hvør hevði framt slíkan harðskap. Tað var Kukki-Bolli í Stóru Dímun. Hann var ein verri ein, og oyðilegði altíð alt fyri øll. Hann skuldi altíð blaka lort og tosa lort.*

*Olli-Bolli hugdi yvir á Stóru Dímun, og sum væntað stóð Kukki-Bolli har og flenti so hart, at hann næstan datt. Olli-Bolli hataði vanliga ikki nakran, men Kukki-Bolla hataði hann. So haturin til Kukki-Bolla var mega stórur, størri enn klumpurin av lorti, sum lá á nýggju duramáttuni.*

*Olli-Bolli hevði fingið nokk.*

*Hann fór niður í kjallaran og opnaði eina skuffu. Har lá byrsan hjá honum. Hann tók hana og fór út, siktaði eftir Kukki-Bolla og skeyt. Kukki-Bolli stóð stillur í nøkur fá sekund, so datt hann framav og oman av berginum á Stóru Dímun, niður í sjógvin, og har fleyt hann so.*

Olli-bolli hyggur ikki á barrvørðin, knappliga sær hann reyð og blá blinkljós uttanfyri, Olli-Bolli drekkur liðugt og smekkar pening á borðið.




22
OLI BOLLI

# GHOST STORIES



## Gongin

Einaferð kom eg inn á Háskúlan kl 8.30 ein mánamorgun. Øll svóvu og eingin var úti í gongini. Knappliga hoyrdi eg onkran manerera í køkinum, og so eini fótafet ganga frá lítla køki yvir til hurðina út til skúlastovugongina, eg hoyrdi hurðina til skúlastovugongina opna. Eg gekk yvir fyri at síggja, hvør viðkomandi var, men tað einasta eg sá, var hurðina, sum bleiv opnað, fara aftur. Eg kannaði so stovurnar og hugdi, um tað var ljós á kontórinum, men eingin var har. Eg føldi einki tá, eg føldi meg ikki bangna, men nokkso avslappaða, eg sá ongantíð nakran, men ikki fyri enn aftan á hugsaði eg, at tað var løgið.

**- Dina**

## Skuggin aftan fyri hjørnið

Tað var eitt friðarligt kvøld á skúlanum. Eg var í kamari 17, við míni vinkonu Halldis. Vit vóru leingi uppi og klokkan var umleið 02. Vit sótu bara og tosaðu, men tá klokkan var farin eitt sindur av 02, løgdu vit okkum at sova. Halldis sovnaði beinavegin, men eg eri ein náttarravnur, so eg var uppi ein løtu longri. Klokkan var nú um 03 um náttina, og eg skuldi leggja meg, men ta náttina hevði eg ringasta marruna, eg nakrantíð havi havt, hon var so vemmilig, at eg ikki klári at seta orð á tað. Men eg kláraði ikki at sova, so eg fór líka á vesið fyri at vita um, eg so fór at sovna tá eg kom aftur.
Eg fór upp, opnaði hurðina spakuliga, so eg ikki vakti Halldis, fór úr kamarinum, og tá ið eg nærkaðist kamari 16, har tvær av mínum vinkonum sova, frysti kroppurin hjá mær púra av sær sjálvum.

## Tá ljósið fór

Klokkan var 23:50 eitt hóskvøld. Eg hevði sløkt ljósið í kamarinum og tendraði lampuna. Men tá eg skuldi tendra hana, hendi okkurt løgið; peran tendraði ikki, hon brast. Eg hugsaði ikki nógv um tað, og ætlaði bara at fara í song og finna útav dagin eftir, um eg kundi skifta peruna. Men so hoyrdi eg, at tær í kamarinum við síðurnar av fóru út í gongina, tí streymurin var farin í teirra kamari. Eg royndi at tendra ljósið í mínum kamari, men streymurin var eisini farin har. So fóru eg, Birita og Leann runt í hini kømrini at spyrja, um tær eisini høvdu mist streymin, men vit funnu skjótt útav at tað bara var hjá okkum - kamari 18, kamari 19 og á vesinum, at eingin streymur var. So hesa náttina vóru vit noyddar at sova í bølamyrkri, sum vit ikki vóru sera nøgdar um, tí tað sigst, at tað spøkir á skúlanum.

**- Katrina**



Eg varð so kløkk, og føldi kuldan renna gjøgnum kroppin. Eg hugdi upp í vindeygað framman fyri mær og sá ein skugga. Eg vendi mær so við og sá einki, men beint tá eg vendi mær aftur, sá eg ein skugga í eygnakrókinum, eg valdi bara at skunda mær inn á vesið.
Eg skundaði mær aftur inni í kamarið og stongdi hurðina, tí eg hevið ein løgna kenslu. Eg legði meg í songina at hyggja í tablet, tí eg sovnaði ikki. Nú var klokkan um 04. Meðan eg liggi, hoyri eg ljóðið av fótafetum, sum mintu um tramp, men kortini ikki. Knappliga steðgaðu tey, og kontaktin á hurðini fer skjót niður og upp nakrar ferðir.
Eg gjørdist sera kløkk, men valdi at legga tablettin frá mær, og vendi ryggin til hurðina og legði meg at sova. Næsta dagin fortaldi eg Halldis, hvat eg hevði upplivað. Hon var kløkk at hoyra hetta, tí hon hevði einki hoyrt.

**- Tóra**

# Skúladjór

Her á Háskúlanum hava vit nøkur djór. Øll eru ikki okkara, men vit eru so góð við tey. Vit kalla tey Háskúladjórini.




Leika er kettan, sum býr á Háskúlanum. Hon er grá og hvít, og so er hon so mega fitt og spøk. Hon hevur so fínan, og mjúkan pels. Vit øll verða so glað, tá ið vit síggja hana, og fara beinavegin at kína henni.Tað dámar henni væl.
Leika býr í arbeiðis rúminum hjá Ára, sum er beint undir køkinum. Har verur hon nógv forkelað, tí Ári gevur henni restir frá køkinum, tá ið vit eru liðug at eta.




Bongo er hundurin, sum býr beint uppi yvir Kiosk Active.
Hann er ein svartur labrador og er so fittur og kerligur, og hann elskar, tá ið vit koma at heilsa uppá hann.
Eigarin hjá Bongo heldur, at tað er so stuttligt at hoyra, hvussu vit øll á Háskúlanum eru so góð við hundin hjá honum.




Triðja djórið, ella hevði eg skula sagt: djórini, eru tær tríggjar hønurnar, ið búgva í havanum hjá Háskúlanum. Tær búgva beint uttan fyri køksvindeyga.
Hesar hønurnar eigur skúlin eisini, og tær eru ordiliga penar og stórar.
Hønurnar gera nú ikki tað stóra, men vit øll eru sera góð við tær, og so eru tær væl passaðar.




Ja tit hoyru meg rætt: rottan.
Einaferð kom Ári inn við einari rottu, sum hann hevði fanga fyri onkran, og so skjótt vit frættu tað, vildu vit sleppa at síggja hana. Hon var stór, brún og hevði ein langan hala, og so sóu vit eisini hennara stóru tenn. Tað var ein stuttligur dagur fyri flestu okkara, tí nógv okkum høvdu ongantíð sæð eina rottu so nær.
Men tíverri kundi rottan ikki vera verandi, so Ári segði, at nú máttu vit siga farvæl við rottuna.
Tað gjørdu vit so, nógv vórðu eitt sindur kedd, tí rottan var so fitt, men hon verður aldrin gloymd, og tí fer hon altíð at verða ein partur av Háskúladjórunum.

# Sjokoláta muffins
## við Oreo kremi


Reklama - Dina

Uppskrift: Tóra Birgirsdóttir Lauritsen

**Tilfar til muffins - 24 stk**
**100 g av myrkari sjokulátu**
**250 g av hveitimjøl**
**250 g av sukri**
**2 tsk av vaniljisukri**
**5-6 spsk av kakao**
**1 tsk av natron**
**1 dl av mjólk**
**1 dl av oljumagarini**
**2 dl av jogurt, hvítu ella blaki**

**Arbeiðsháttur**
Hita ovnin til 200 hitastig
Sker sjokulátuna í smaár puntar og blanda hana saman við turra tilfarinum.
Píska tað váta sman við tí turra tilfarinum.
Koyr deiggið í muffinsformar og baka mittast í ovninum í 15 min og nýt tínar nýbakaðar muffins.

**Oreokrem**
200 g av reinum smyrjiosti
200 g av margarini
200 g av flormelis
4 tsk av vaniljusukri
1 pk av Oreo

Knús Oreokøkurnar og blanda alt í ein bolla og píska til alt er væl blandað. Lat tær kølna eina løtu, smyr ella sproyta á muffins og nýt tínar lekru muffins.

# Pollo y Arroz
# de Puerto Rico



Recipe: Ezekiel Joseph (Zeke)

**About 15 chicken drumettes, or preferred parts**
**3 cups of water**
**¼ cup of chopped green pepper**
**½ cup of chopped red pepper**
**1 small onion chopped**
**½ tsp of garlic powder**
**Salt and pepper to taste**
**10 olives (Pimentos)**
**½ corn tomato sauce**
**1 envelope of sazon (spanish spice)**
**1 tsp of cilantro**
**A small jar of red pimentos for garnish (optional)**

Boil drumettes for about 20 min in 3 cups of water, add a little salt, drain and save water later for the rice.
In a medium frying pan, make the "sofrito". This is what gives the rice the Spanish taste. Heat the olive oil in medium heat. Add onions and sauté until transparent, making sure they don't burn. Add red and green peppers, then green olives. Sauté for about 2 min. Add salt, pepper, garlic powder, tomato sauce, cilantro and sugar.
Add "sofrito" to the chicken drumettes. Coat chicken really good with the sofrito. Cook for about 5 min.
Cooking measurement chart for rice: 7oz is 1 cup of rice, add 2 cups of water, this yields 4 " for 2 cups of rice, 2 cups of rice and 4 cups of water, yield 8 cups. 3 cups of rice and 6 cups of water, yield 18.
Add the right amount of water according to how much rice you want to cook. Start with 1 cup at first until you get to know the cooking utensils and stove.
Add water and the chicken and bring to a boil. Add rice + stir. Cover, reduce heat.
Simmer for about 20-25 min. It could take a little longer. Rice is tricky. Keep an eye on it.
Add the pimentos (Olives) of garnish.
I use the short grain rice.

# Ferðafrásagnir

## Ferðin út í Koltur



Tann næsta dagin á háskúlanum fóru vit útferð til Koltur við tveimum speedbátum.
Klokkan 10 fóru vit til Gomlurætt, har vit lótu okkum í draktir, og eitt sindur yvir 10 fóru vit út í Koltur. Tá vit komu, var sólin frammi, og Bjørn Patursson tók ímóti okkum. Hann og konan eru tey einastu fólkini, ið búgva í Koltri. Hann vísti okkum runt á oynni og fortaldi okkum eina søgn um Ásu frá Hesti og Magnus frá Koltri. Tað minti eitt sindur um Romeo og Juliu, og tað var soleiðis vit funnu uppá leikin, sum vit skulu spæla í desember. Í Koltri eru nøkur gomul hús, sum tey hava gjørt í stand, so vit fóru í eitt at eta matpakka.
Nøkur valdu at ganga niðan á minsta fjallið í Føroyum, sum er umleið 30 metrar, men nøkur tímdu ikki, so tey fóru oman til fjøruna og tann hvíta sandin at tosa og dansa.
Túrurin heim var mega stuttligur. Tað vóru so nógvar aldur, at tað var sum at vera í einum rutsjibana í Tivoli. Beint áðrenn vit komu til keiina, argaði maðurin, sum stýrdi bátinum, okkum. Vit hildu, at vit fóru at renna beint í brimgarðin, men í seinastu løtu vendi hann bátinum, so tað føldist, sum um man næstan datt úr. Summi vórðu bangin, men tey, ið sótu frammarliga, hildu, at tað var so stuttligt.
Meðan vit bíðaðu eftir bussinum, stillaðu vit okkum í ein ring og sungu ein sang, og um 17 tíðina vóru vit heima aftur. Hetta var ein góður dagur og ein góð byrjan til háskúlaárið 2021/22.



## Rógving



Tann 8. september fingu vit at vita, at vit skuldu fara at rógva klokkan 14, men tað fór ikki at vera ein heilt vanligur róðrarbátur. Hesin báturin æt Teinæringurin og var eitt 20-mannafar.
9. september kom, og klokkan nærkaðist 14. Summi vóru meira spent enn onnur, men øll komu við.
Vit gingu oman til bátahylin, og har stóð báturin klárur. Vit fingu vestar at lata okkum í, og so settu vit okkum í bátin. Tey ið longu høvdu róð fyrr, ella vistu hvussu man gjørdi, sótu afturi í rong, og hini, ið ongantíð høvdu róð, sótu frammi í skutinum, og hini ið vistu umleið, hvat man gjørdi, sótu í miðjuni, soleiðis vórðu vit deild upp.
Búi Brattaberg var stýrimaður og segði okkum, hvussu vit skuldu gera. Hann var ordiliga fittur og stuttligur.
Tá ið vit vóru komin úr bátahylinum, byrjaðu vit ordiliga at rógva, men beint tá kom Norrøna, sum skuldi legga at, men vit fingu ikki vent við, so vit máttu bara bremsa og bíða. Fleiri hildu tað var mega kul og stuttligt at vera so nær við Norrønu, og summi vóru eitt sindur bangin, men tað var einki farligt, tí

Norrøna var langt vekk frá at renna á okkum. Tað besta var reaktiónin hjá Súsannu, hon var so bangin og segði: 'Nú fer Norrøna at renna á okkum'.  Vit flentu, tí vit vistu at tað ikki fór at henda.
Tá Norrøna var farin longur yvir, fóru vit aftur at rógva. Vit róðu yvir í Sandagerð, har vit fingu okkum eina pausu og ein drekkamunn við kakao.
Tá ið eini 15 minuttir vóru farnir, fóru vit aftur at rógva. Vit róðu yvir til har, Ternan leggur at, og so róðu vit yvir aftur til bátahylin.
Tað var ein mega stuttligur dagur, og veðrið var av tí besta. Vit takkaðu Búa fyri, at hann kom við okkum, og so fóru vit aftur til skúlan.
Tá ið vit vóru komin aftur til skúlan, vóru nógv móð, og tey flestu fóru inni í kamarið at hvíla seg.
Tað var ein strævin dagur, men eisini ein mega góður ein :)



## Nólsoy





Vit fóru til Nólsoyar ein fríggjamorgun í oktober. Vit fóru úr Havn við Ternuni um morgunin, og tá vit løgdu at, tók Maud ímóti okkum og vísti okkum Prinsessutoftirnar. Síðan fóru vit til Jens-Kjeld, har hann vísti okkum mongu útstappaðu djórini, hann hevur í verkstaðnum. Vit fingu eisini lov at halda í livandi kakkulakkum, men tað vóru fá, sum bjóðaðu seg fram til at royna tað. Síðan ótu vit matpakka og gingu ein túr. Tað var meiningin, at vit skuldu í pott, og síggja, meðan ein seyður var flettur, men hesi bæði blivu av ongum :(
Aftan á túrin runt Nólsoynna, fóru vit heim til Maud, har hon vísti okkum áhugaverda urtagarðin hjá sær, við káli, gularótum og nógvum øðrum. Síðan fóru inn til hana at eta døgurða. Har fingu vit lekran fisk og eplir, og ís omaná.
Kl. 16:50 fóru vit úr Nólsoy, og so heim í heystferiu.

## Suðuroy

On Wednesday (Oct, 27th) we docked in Suðuroy from Tórshavn around 1800 and arrived to Halldis' mom, Alma's house. For supper I had stuffed bread, liver paste with cheese & crackers, pizza snails, pudding, plus a couple others. Once everyone finished eating we took a 30 min car ride to an airbnb. After unpacking we played "What Do You Meme?" the card games. In the morning of the 28th our class slowly hiked up Mt. Hvannhagi (On the left are pictures by Tóra). We later split into two separate groups (Group 1 went farther down the mountain), though eventually met back up to drink tea at Janus' house. When everyone had arrived, the next stop was visiting a local coal mine, it ended up being very windy. A few hours later some of us went out for indoor swimming at a place called Pálshøll, afterwards when it was closer to the night, we ate at a Filipino buffet. In the morning, our group took a car to the Beinisvørð cliff for the cold morning view, drove to rock climb from the same place where we swam, but a different building called Marghøll. Then stopped by Keyp Blue Cross while in the area, from there, we packed up and left for the 1600 ferry.





# SQUID GAME



Eg eri heilt vís í, at øll hava í minsta lagi hoyrt um koreansku netflix seriuna, Squid Game. Men um tú ikki hevur hoyrt um tað, so handlar tað um ein stóran bólk av fólki, sum eru í stórari skuld, og mangla pengar, sum mugu berjast til deyðans í einari røð av gomlum barnaspølum, fyri at vinna ein svaka mongd av peningi. Hóast tað óoriginala konseptið uttanífrá, haldi eg at tað er ein spennandi viðmerking um samfelagið og tað, sum fólk bjóða seg fram til at gera fyri pengar. Kortini haldi eg eisini at har eru ivasamar fløkjur við persónunum og endanum av seriuni sum heild.
Allíkavæl haldi eg at tað er vert at hyggja eftir, við víðum sjónarringi!




**Squid Game**
Serian hjá Hwang Dong-hyuk kom út á Netflix 17. september, 2021

Ummælt hevur Leann

# Big Mouth



Big Mouth er ein Amerikansk animerað sitcom fyri vaksin, sum er skapt av Nick Kroll, Andrew Goldberg Mark Levin, og Jennifer Flackett, sum er bygd á tannáringaárini hjá Kroll og Goldberg, tá ið teir vuksu upp í høvuðsstaðnum New York City.
Tey granska pubertetin, ímeðan tey fevnast við opinleikan um menniskjakroppin og kyn. Tað er ein bólkur í 7. flokki, sum kemur í pubertetin, og við teimum hava tey pubertetóðjór, sum hjálpa teimum á veg.
Eg haldi at hendan serian er sera undirhaldandi og kann læra okkum um menniskjakroppin, at kroppar eiga ikki allir at vera líka, og at øll hava sín egna máta at granska pubertetin, kropsliga og sálarliga. Serian er til 16 og eldri, so hendan serian er ikki at viðmæla fyri børn.




**Big Mouth**
Serian hjá Nick Kroll og teimun kom út á Netflix 29. september, 2017

Ummælt hevur Tanja

# The song of Achilles




"I could recognize him by touch alone, by smell; I would know him blind, by the way his breaths came and his feet struck the earth. I would know him in death, at the end of the world."

**The song of Achilles**
Útgivin í 2012.
Rithøvundur er Madeline Miller
369 síður

Ummælt hevur Elisabet



Patroclus er føddur prinsur í einum lítlum kongaríki í forna Grikkalandi, og er sonur hjá einum óreinum kongi. Tá ið hann av óvart kemur til at drepa sonin hjá einum aðalsmanni, verður hann útlagin til Phthia, har hann møtir tí evnagóða, vakra, og erliga Achilles, gudføddi sonur kong Peleus og sjónymfuna Thetis. Achilles velur sær Patroclus sum sín tænara og vinman, og teir báðir dreingirnir menna eitt vinalag, sum blómar til romantikk.

Mær dámar væl, hvussu man er við høvuðspersóninum frá, tá ið hann var lítil, og lesur hansara sjónarmið ígjøgnum alla bókina. Patroclus er ein fittur drongur og er ein karakterur, sum er nemmur at dáma, og at hava samkenslu við. Hann er ósjálvsøkin, og er fittur við tey fólk, hann kemur fram á. Achilles, sum er hin høvuðspersónurin, er meira arrogantur, og sjálvsøkin, sum serliga kemur fram í endanum á bókini. 100 tær fyrstu síðurnar eru spennandi og hava nógvar hendingar.
Tá ið eg kom til miðjuna av bókini, gekk tað eitt sindur seinari fyri seg. Tað fokuserar for nógv um eitt tíðarskeið, sum bara blívur troyttandi at lesa um. Endin av bókini var góður, men fær teg at føla teg tóma aftaná.

# En **blå** rygsæk og et skattekort

## Min landing på Færøerne

Af Olivia Binding Jakobsen

Alene i lufthavnen. Jeg står ved security tjek. Rullebåndene har taget min bagage, det eneste jeg har er min blå rygsæk. Jeg tror jeg har pakket alt, men der er sikkert noget jeg har glemt. Lige om lidt flyver jeg over Danmarks flade landskab, langt væk.

Jeg lander i Vagar lufthavn kl 19.00 om aftenen, solen skinner og jeg bliver budt velkommen af frisk vind. Jeg bruger hele taxi turen på at betragte fjeldene, der rækker op mod himlen imens jeg hører om at ingen låser sine døre eller banker på.
Solen er gået ned, da jeg når skolen hvor forstanderen står, og tager imod mig med et stort smil. Sammen får vi båret mine to 23kg kufferter op på mit nye værelse.
Jeg sidder på værelset med min uspiste sandwich hjemme fra, og kigger ud ad vinduet. Jeg betragter alle de nye lys, jeg fornemmer fjeldene og ænser en spids af havet, der bølger op mod kysten.

Det var min første aften, det er 2 måneder siden nu. I mellemtiden har skemaet fået sin rytme med morgen bevægelse (de fleste dage udstræk), morgenmad og undervisning osv. Vores første projekt på skolen var at male et kæmpe lærred, det gør hver årgang.
Vores motiv blev skabt ved at danse færøsk folkedans med farvet lerpulver på fødderne.
Til billedet lavede vi en film, der blev projekteret oven på lærredet. Til at opsumere videoen vil jeg sige tre ting: sorte regnjakker, udklippede ord til digte og alternative baggrundslyde lavet af sakse, lynlåse, klap, kalimba og et klaver. Men det var bare det første projekt.
På højskolen består vores hverdag af mange ting, som i kan se i *Tjaldrið*.

Nu sidder jeg igen ved mit skrivebord. Jeg er lige kommet fra en hyggelig færøsk time, hvor vi har sunget fra den færøske sangbog, læst en børnebog og skrevet sætninger.
Jeg har fået til opgave at skrive et digt på færøsk.
Jeg finder sprotin.fo frem.
Jeg starter med at skrive om en stjerne, der bliver til en hvileløs nat hvor husdøren står åben. Jeg sidder med en bøjnings guide til ordene, og prøver at læse det som et skattekort
Det her er hvad der kom ud af opgaven:



***Hvør og ein liggur***
***undir dýnuni,***
***men við mítt hús***
***stendur hurðin opin.***
***Eg eri við havinum***
***skúmfroðandi alda***
***sigur vælkomin heim.***
***Meðan fjøllini***
***spæla trummu.***
***Eitt flogfar fer í***
***náttarmyrkrinum.***
***Eg andi.***




COLLABORATIVE PLAYLIST

# Tjaldur playlist

•*.,♡elliboboe♡,.*• • 8 likes • 12 songs, 44 min 56 sec

| # | TITLE | ALBUM |
|---|---|---|
| 1 | Sunflower - Spider-Man: Into the Spider-Verse<br>Post Malone, Swae Lee | Spider-Man: Into the Spider-Verse (Soundtrack From & Inspired by ... |
| 2 | Yeah!<br>Sund Fornuft, Kenneth Kold | Så Sundt Som Det Er Sagt |
| 3 | Starman - 2012 Remaster<br>David Bowie | The Rise and Fall of Ziggy Stardust and the Spiders from Mars (201... |
| 4 | My Universe<br>Coldplay, BTS | Music Of The Spheres |
| 5 | Savior Complex<br>Phoebe Bridgers | Punisher |
| 6 | Test Drive - From How To Train Your Dragon Music From The Motion Picture<br>John Powell | How To Train Your Dragon (Music From The Motion Picture) |
| 7 | Go Flex<br>E Post Malone | Stoney (Deluxe) |
| 8 | Eternally<br>TOMORROW X TOGETHER | The Dream Chapter: ETERNITY |
| 9 | Time After Time<br>Eva Cassidy | Time After Time |
| 10 | Homage<br>Mild High Club | Skiptracing |
| 11 | Gullspunnin<br>Eivør | Segl |
| 12 | Redbone<br>E Childish Gambino | "Awaken, My Love!" |




Skanna!!

# Fyrr og nú myndir





Tað, sum eg haldi er so áhuga-
vert við at síggja myndir frá
fyrr í tíðini, eru tankarnir,
sum koma við teimum.
Hendan myndin varð tikin við
ætlan um at minnast.
Fólk, sum liggja í mold, hava hildið,
hugt, følt og hugsað við myndini.
Hesin háskúlin hevur so nógv fótaspor
boraði niður í gólvið.
Veggirnir bera nógv loyndarmál, sum
fyrrverandi næmingar hava tulkað
ímillum sín.
Háskúlin hevur borið upp á
smíl og látur, men eisini pínu,
kenslu og tár, sum eru dottin
ímillum rivnurnar á gomlu
træbrettunum, sum halda hend-
an háskúlan so høgt uppi.
Um tú gongur gjøgnum gongd-
irnar, sært tú lítil herverk;
skápini, sum eru teknað innaní,
farvurnar, sum eru farnar við tíðini, og
øll listaverkini, sum hava søgu aftan
fyri.
Um tú hyggur at hesum gomlu
myndunum, sært tú, at ikki nógv er
broytt.
Um tú fert útum, er tað sum tú ert farin
aftur í tíð og stendur akkurát har, tey
hava staðið.
Tú kanst síggja, hvar tey stóðu og
bara fyristilla tær, hvat tey hugsaðu
og gjørdu akkurát ta løtuna, tey tóku
myndina.

*-Dina Fríða Poulsen*























föroya fólkaháskúli
skálin







# Yrkingar

Et lysindfald bryder igennem.
Skubber farver ind i de mørktonede skyer.
Nattens vildskab er i færd med at forstumme.
Jeg ser på dit ansigt, din solramte hud.
Dine rynker er tydelige

Jeg forestiller mig, du er blevet ældre
at du har bevidsthed, om alt der er sket.
Jeg ser fuglene, der letter og lander
i dit gråsprængte hår.
Bølgerne der skyller ind
i dit skæg

Vi snakker i stilhed,
mens vi mærker lysets stråler
på hver vores hud.
Jeg hører børnestemmer.
Stilheden er brudt.

Jeg rejser mig fra græsset.
Lytter til børnenes leg.
Forbindelsen mellem os løsner sig.
Magien stilner hen.
Men i klippens dybe grå
findes der en hemmelighed.
Dit skjulte ansigt smiler til mig.

- ***Olivia***

Hendurnar hjá mær, eg havi tvær
við 5 fingrum á hvørjari.
Mínar hendur eru ikki
sera klænar men eitt sindur
stórar, mínar hendur
eru ei heldur mjúkar, men ofta hvassar
og eru eisini heldur ikki altíð penar.

Men tað bilar ei, tí mínar hendur
hjálpa mær á leið, tær hjálpa mær
at skriva, tekna og at kela
míni djór, hjálpa mær at merkja/føla,
tær geva mær møguleikan at halda
í hondini hjá mammu og pápa mínum
um eg eri bangin, og hjálpa
beiggja mínum.

Tær hjálpa mær at arbeiða
tí tað eru tær, ið altíð verða skornar
av pappi og øðrum, tær hjálpa mær
at føla vegin inn tá eg eri illa fyri.

Tær eru helst
eitt sindur løgnar og kanska
ikki tær vakrastu og lukta
viðhvørt, men tær eru mínar
hendur og eg elski tær.

- ***Tóra***

New to Tórshavn
Fog surrounding everything
The sunlight shines still

Walking through town square
Busy people traveling
Wandering alone

Momentarily
Only haphazard seasons
My indecision

- ***Zeke***



# Horoskop

**Veðrur** (21. mars - 19. apríl)
Tú ert sjálvstøðug/sjálstøðugur, og dámar væl at stýra. Tú vilt vera tann besti, og dámar væl kapping. Um tú roynir, kanst tú finna rætta makan í 2022.

**Tarvur** (20. apríl - 21. maj)
Trupulleikar, møði og lítil orka verður ikki vanligt, og tí hevur Tarvurin møguleika at vera sera nøgdur við sítt arbeiði.

**Tvíburar** (22. maj - 21. juni)
Fylg tínum íblástri og royn at koma fram við tí. Tvíburin fer at stremba eftir at fáa góð úrslit.

**Krabbi** (22. juni - 22. juli)
Kærleiki og forhold fara at blóma aftan á fyrru helvtina av 2022 við hjálp frá Venus og Mars. Tú fert at vera ein stór hjálp fyri onnur.

**Leyva** (23. juli - 22. august)
Tú fert at hava stórt fokus á títt samband við onnur í komandi tíðini. Tú kemur longri í toymi, heldur enn fyri teg sjálvan, hóast tær dámar títt frælsi. Nógv av tínum núverandi sambondum verða djúpri, ella, um tú leitar, kanst tú finna perfektu spegilsmyndina.

**Jomfrú** (23. august - 22. september)
Í byrjanini av desember fert tú at fáa stór tíðindi um starvið, sum verður hátíðarhildið. Trúgv upp á teg sjálvan nú, tí so kemur tú langt.

**Vekt** (23. september - 22. oktober)
Jupiter og Saturn hjálpa Vektini, so hon er før fyri at stýra sínum lívi við góðum avgerðum og fólkaskikki í 2022.

**Skorpión** (23. oktober - 22. november)
Hjá Skorpiónini fer tað at ganga frálíkt við arbeiðinum. Tað fer at ganga væl fíggjarliga hjá tær, og títt sosiala lív verður gott.

**Skjúttin** (23. november - 21. desember)
Tú kanst røkka tínum málum við at vera pragmatisk/-ur og klók/-ur, og tú skalt vera realistisk/-ur, tá tú roynir at røkka tínum málum.

**Steinbukkur** (22. desember - 19. januar)
Hetta komandi árið er gott hjá lesandi at stremba fram ímóti hægri útbúgving. Ikki ræðast torførar støður, royn heldur at finna alternativar loysnir.

**Vatnberi** (20. januar - 18. februar)
Tú fert at taka meiri ábyrgd komandi árini, men tú kemur eisini at síggja nýggjar góðar byrjanir. Umhugsa øll málini, tú ynskir at røkka í komandi tíðini, og byrja at manifestera tey nú.

**Fiskur** (19. februar - 20. mars)
Ver støðug at uppnáa tíni mál í lívinum. Fylg tínum sansum fyri at árið skal eydnast væl.


THERE IS
AMONG MEN
-Proverbs 30-
-11-14-
Hannah 2021
Nolsøe




á Føroya Fólkaháskúla
17. desember 2021